Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Hálsar landsstýrið um?

## *Oddagrein*

Í dag er ein vika til næsta samráðingarumfar millum landsstýrið og stjórnina um fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. Men nú er líkt til, at flokkanir landsstýrinum draga ikki somu línu. Tað vísa greinirnar í Dimmalætting og í Sosialinum og sendingin Føroyar í dag í Útvarpinum týskvøldið.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN heldur í øllum førum alment fast um fullveldisætlanina. Tað sama ger løgmaður, og tað má hann í øllum førum gera, til landsstýrið alment boðar frá, at landsstýrið broytir samráðingarætlan. Hinvegin tykist vera greitt, at tað er gingið upp fyri Fólkaflokkinum, at tað ber ikki til at røkka upprunaligu fullveldisætlanini. Serliga tá stjórnin tvíheldur um eina 4 ára langa skiftistíð. Tað er neyvan av tilvild, at tveir landsstýrismenn hjá Fólkaflokkinum hava sagt alment, at fullveldisætlanin má koppast á, hóast endamáið er tað sama - at skipa Føroyar sum fullveldisríki.

Í grundini merkir henda áskoðanin, at landsstýrið hálsar um, og fer eftir eini loysn, sum minnir um uppskot Javnaðarfloksins og er ein „stig fyri stigætlan". Sambært keldum hjá Sosialinum skal Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, hava ásannað, at neyðugt er helst at broyta samráðingarætlan. Hann dugur óivað at skilja, at semja verður ikki um fullveldisætlanina í landsstýrinum, og harafturat fer føroyski veljarin heldur ikki at taka undir við henni. Ta hava í øllum førum fleiri meiningarkanningar víst.

SO er spurningurin, hvat „tann harða kjarnan" í Tjóðveldisflokkinum sigur. Vil hon hava alt ella einki - tað merkir: fer hon góðtaka, at vit koma eitt stórt stig á sjálvstýrisleið? Ella heldur hon fast um fullveldisætlanina sum tann einasta møguleikan?

TRÍGGJAR samráðingar hava verið og føroyska samráðingarnevndin kann ikki koma einaferð afturat sum av torvheiðum. Nú skuldi eisini borið til at komið longur framá, tí tann stóri spurningurum um skiftistíðina - sjálvur trupulleikin - er tikin úr samráðingunum.

Løgmaður roynir sjálvandi at halda fast um samgonguna, tí um Tjóðveldisflokkurin fer burtur úr við tí grundgeving, at hann fær ikki nóg mikið av sínum politikki í einum samráðingarúrslitið, so verður fullveldismálið ella tjóðskaparspurningurin framhaldandi eitt sokallað rumbulsmál. Tí roynir løgmaður at halda fast um Tjóðveldisflokkin.

Hinvegin veit bæði løgmaður - og Tjóðveldisflokkurin - at løgmaður hevur ein annan meiriluta í Løgtinginum fyri eini hóvligari loysn, sum Javnaðarflokkurin, meirilutin í Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin kunu taka undir við. Løgmaður fer sjálvandi sum longst at halda seg til verandi ætlan, men spurningurin er, um hann ikki eisini vil vera hann, sum flutti Føroyar longur fram móti veruligum sjálvstýri, og tí saðlar um, um verandi tilgongd dregur út. Men løgmaður má gera sær greitt, at tíðin styttist.

***Sosialurin***

# Sangskúli Føroya

At íslendingar eru eitt syngjandi fólk, vita øll, sum hava havt samband við grannatjóð okkara fyri vestan. Ikki minst hugtiknir hava føroyingar verið av teim manskórum, sum hava vitjað hendavegin, og nøvn sum Stefan Islandi, Guðmundur Jónsson og so mong onnur hava verið sanghugaðum fólki her kunnug.

Men tað er í seinni árum, at sanglívið, fyrst og fremst í Reykjavík, men so við og við eisini úti um alt Ísland, rættiliga hevur tikið dik á seg. Orsøkin til hesa menning var stovnanin av Sangskúlanum í Reykjavík og um sama mundið fyri fjórðingsøld síðan av Óperu Íslands. Eyðsæð er, at slík megnarstig hvíla á fleiri herðum; men tað er ikki at taka nakað frá nøkrum at nevna tvey nøvn burturúr: **Ólöf Kolbrún Harðardóttir** og **Garðar Cortes.** Ikki bert hava tey bæði skarað framúr sum sangarar á altjóða stigi, men hava eisini lagt lív og sál í hetta at menna og skapa gróðrarlíkindi fyri framkomnum sanglívi í heimlandinum. Nú er tað so heppið, at hesi bæði listafólkini hava fingið tokka til Føroya land og fólk og eru sinnað við støði í teirra royndum og førleika at leggja orku í at hjálpa okkum at fáa í lag føroyskan sangskúla eftir íslendskum mynstri og í fyrsta umfari sum deild av teirra virksemi í Reykjavík. hvønn týdning og hvønn íblástur eitt slíkt stig kann fáa fyri tey sangevni og tann sanghug, sum búgva í okkara fólki, er lætt at ímynda sær. Ólöf og Garðar hava havt tvey sangskeið saman frammanundan, og skeiðið nú 8.–15. november er fyrst og fremst ætlað næmingum, sum eru sinnaðir at taka við einum veruligum sangskúlatilboð eftir nýggjár, sum við 4-5 lærarum og undirvísing í sangi, hoyrilæru og tónleikakunning er ætlað at hava í trimum skeiðumførum fram móti summarfrí næsta ár.

Skeiðtilboðið hesaferð er einatímar ella tvey og tvey saman um tíman, og verður tá mælt til 3 ferðir hálvan tíma yvir vikuna. Eisini kunnu upp til 5 næmingar vera saman um tímar í raddarvenjing, eitt tilboð mest til tey ungu í 14-18 ára aldri.

Leygardagin og sunnudagin seinnapartar 11. og 12. november verður kórsangur, har álagt verður øllum sangnæmingunum at verða við.

**Kostnaður:** 250 kr. um tíman at býta eftir luttakaratali og harafturat 100 kr. fyri kórsangin báðar dagarnar.

**Undirvísingarstøð:** Tórshavnar Musikkskúli á Frúutrøð fyrrapartar og barakkirnar niðan fyri gamla Realskúlan seinnapartar og kvøld. Kórsangurin verður í Kommunuskúlahøllini.

**Undirvísingartíðir:** 10.00-13.00, 14.30-18.00, og um kvøldini eftir kl. 20.00 verður sangundirvísing ella samsangur eftir tørvi.

*Tað eru enn pláss til nýggjar næmingar*. Meldið tykkum hjá Petru Iversen í Kvívík og tá helst gjøgnum teldupost **– adressa: petra@post.olivant.fo** – *í seinasta lagi mánadagin 30. oktober.*

Skeiðsgjaldið sambært tí tímatali, sum avtala verður gjørd við Petru um, verður innan skeiðið at flyta á konto í Føroya Sparikassa nr. 9181 130 292 4.

**Ólavur Hátún**



**og Petra Iversen**

## Viðmerkingar:

# Misupplýsing

Vit vistu, at føroyskt flagg og mál, tíbetur, hava gott pláss innast í hjartanum á Jóannesi Eidesgaard. Men Jóannes, bæði flaggið og málið vilja sleppa út at blaktra frítt, blaktra frítt, blaktra frítt og ljóða frítt, ljóða frítt, ljóða frítt. Tað eru 144 ár síðan kongligi einahandilin varð avtikin, er tað ikki upp á tíðina, at vit koma út við okkara innispunna tógvi? Út at blaktra og ljóða so tað rungar í? Jóannes, tú segði at tað stendur í Heimastýrislógini, at vit eru ein tjóð. Men tú segði ikki alt (og John Sigurð læt teg sleppa), tí tú gretti ikki, at tann danski teksturin, sum okkara danska stjórn gongur eftir, IKKI SAMSVARAR við tann føroyska,: hann sigur ikki, at vit eru „en nation" ella „et folk," men „et folkesamfund" - eitt orð sum er uppfunnið til Heimastýrislógina, tí teir ráðandi í Danmark sum enn hava evsta vald í Føroyum, ikki vilja viðurkenna okkum sum annað enn eitt serligt slag av norðurdanskarum - tað er jú argumentið fyri at teir eiga at hava buktina og báðar endarnar. Tey ungu vita ikki av sær sjálvum av hesum, teimum tørvar upplýsing. Men í samrøðuni millum Jóannes Eidesgaard og SVF týskvøldið fingu tey misupplýsing um, hvat Heimastýrislógin sigur um føroyskan tjóðskap. Er tað ikki ábyrgdarleyst, SVF og Eidesgaard, at breiða vankunnleika út? Vit gomlu, sum kenna tekstin, fingu ein trega í sálina og undraðu okkum enn eina ferð.

**Turið Sigurðardóttir**

## Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

**Blaðleiðslan**



# Nýggi Mentanargrunnurin farin til verka

*Nývalda nevndin í Mentanargrunni Landsins hevði sín fyrsta fund týsdagin. Hetta var ein óformligur fundur, men fyrsti fundurin eftir nýggju kunngerðina*

Stefan í Skorini

Mentanargrunnur Landsins er komin ístaðin fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings, sum nú er avtikin. Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum hevur tilnevnt nýstovnaða grunninum fimm nýggjar nevndarlimir Teir føstu limirnir eru Rói Paturson, sum er formaður, næstformaður er Hanus undir Leitinum, meðan Urd Johannesen, Kirsten Brix og Eyðun Johannessen eru vanligir limir.

Eftir gomlu kunngerðini vórðu tríggir limir valdir av Løgtinginum, ein av Landsstýrinum og ein varð valdur av Listafólkasambandi Føroya, men nú verða allir valdir av landsstýrismanninum.

Varalimirnir í nýggju nevndini eru Marianna Debes Dahl, Brandur Øssurson, Elin Súsanna Jacobsen, Marjun Berg og Birgir Kruse.



*Fyrsti fundurin hjá nýggju nevndini í Mentanargrunni Landsins var týsdagin uppi í Mentamálastýrinum, har allir limirnir vórðu komnir til fundar Mynd: Jens Kr. Vang*

### Býta út í næstu viku

Fundurin týsdagin var bara ein óformligur fundur, har nevndin umframt varalimirnir vórðu savnað. Eingin stór avgerð varð tikin á hesum fundi, men nøkur smáting skuldu fáast uppá pláss, áðrenn farast kann til verka av álvara.

Tey arbeiða undir eini nýggjari kunngerð, sum varð kunngjørd 21. september í ár og varð sett í gildi dagin eftir. Nevndin er eisini nýggj og skal leggja seg til rættis fyrst.

Til fundin í næstu viku eru 26 umsóknir komnar nevndini í hendi, og tá verður avgjørt, hvørjar umsóknir verða gingnar á møti, og hvørjar verða lagdar til viks. Paulivar Andreasen, sum hevur verið skrivari í nevndini í fleiri ár, sigur, at vanligt er, at eini 10-15% av umsóknunum fáa avslag, meðan øll restin fær pening játtaðan.

Eftir nýggju kunngerðini skal ein tíðarfreist fyri umsóknir setast. Henda tíðarfreist er ikki lýst enn, men hetta verður tikið upp á næsta fundinum týsdagin.

Fyrr varð arbeitt soleiðis, at nevndin hevði seks fundir um árið, og tá varð støða tikin til tær umsóknir, sum vórðu komnar inn síðan seinasta fund. Paulivar Andreasen sigur, at í fjør komu 240 umsóknir inn, og tað eru 40 til hvønn fundin.

Játtanin í ár hevur verið 2,5 milliónir krónur, og hon hevur verið spakuliga vaksandi seinastu árini. Í kreppuárunum varð skorin ein hálv millión av.

Peningur verður játtaður Mentanargrunni Landsins á fíggjarløgtingslógini. Nevndin umsitur sjálvstøðugt játtanina og aðrar inntøkur, og ger sjálv av, hvussu nógvar starvslønir verða latnar um árið.

Hann heldur ikki, at arbeiðsgongdin má broytast nógv, nú nýggj kunngerð er sett í gildi. Paulivar hevur avgreiðsluna um hendi, og hon verður nakað tann sama sum áður, men tó eru nakrar broytingar.

### Skulu menna mentanarlívið

Nevndin kann játta listafólkum starvsløn upp til trý ár. Eisini kunnu tvær starvslønir verða latnar, sum eru galdandi í eitt ár. Til ber eisini hjá nevndini at lata starvslønir niður í ein mánað. Ein starvsløn svarar til eina lærararløn í fólkaskúlanum á lønarstigi 21, stig 1.

Eftir gomlu kunngerðini kundi nevndin ikki lata starvsløn í meira enn tveir mánaðir, men um serligar umstøður talaður fyri tí, kundi starvslønin verða galdandi í fýra mánaðir. Eftir nýggju kunngerðini hevur nevndin sostatt fingið víðari ræsur at lata listafólki stuðul.

Paragraf 4 í nýggju kunngerðini sigur, at »endamálið við starvslønunum er at geva listafólkum og øðrum, ið takast við mentanarligt virksemi arbeiðsnáðir í eitt ávíst tíðarskeið at starvast burturav við listarligum ella øðrum mentanarligum arbeiði«.

Umframt starvslønir kann grunnurin eisini stuðla bóka- og fløguútgávum, men hægst 30% av útgávukostnaðinum.

Nevndin kann lata íverksetanarstuðul, sum serliga er ætlaður ungum listafólkum, og stuðul til ymiskar verkætlanir.

Allar umsóknirnar skulu lúka ávísar treytir, ið settar verða, og tey, sum fáa stuðul, skulu lata nevndini roknskap og fráfreiðing, tá tiltakið er av.

**Brúktbilasølan**

BMW 325i



2,5i 6-cyl. 170 hk, árg. 89/90, 185.000 km, grámetallic. Bilurin er innfluttur brúktur úr Týsklandi og er í sera góðum standi

Mercedes 300 turbodiesel



3,0 6-cyl. 147 hk, árg. 1992, 152.000 km, svartmetallic. Bilurin er innfluttur brúktur úr Týsklandi og er í sera góðum standi

MVW Passat turbodiesel



1,6 4-cyl. 80 hk, árg. 1991, 137.000 km, blámetallic. Bilurin er til sølu fyri kunda

*Innfluttir bilar verða handaðir nýsýnaðir við 3. mðr. garanti! Myndir og upplýsingar annars kunnu fáast við posti ella e-mail*

**JB-BILAR**

Hoyvíksvegur 66 - Postsmoga 253 - FO-110 Tórshavn
Tel. 217566 & 217567 - Fax 318722 - E-mail: jb-bilar@post.olivant.fo

*Audi - BMW - Ford - Mercedes - Opel - Volkswagen*

# Molin verður handaður

*Pihl & Søn er liðugt við arbeiðið at breiðka molan, og í dag verður arbeiðið handað umboðum frá býráðnum og Tórshavnar Havn, sum hava goldið hvør sín helming av kostnaðinum*

Stefan í Skorini



Arbeiðsfólk frá Pihl & Søn hava seinastu mánaðirnar arbeitt við at breiðka molan í Havn. Hetta arbeiðið er nú liðugt, og seinastu maskinurnar eru rullaðar av staðnum, og arbeiðsfólkið hevur pakkað saman.

Enn er asfalt ikki lagt á nýggja økið av molanum, men tað var heldur ikki við í tilboðnum. Avtala er gjørd við Landsverkfrøðingin um at asfaltera økið.

Tað, sum enn liggur á láni, er, at umboð frá býráðnum og Tórshavnar Havn skulu kanna arbeiðið nærri og tryggja sær, at alt er væl úr hondum greitt. Hetta verður væntandi eingin trupulleiki, og arbeiðið verður óivað góðkent.

Tað er Tórfinn Smidt, sum er formaður í Havnarnevndini hjá býráðnum, sum á samkomu í morgin alment skal taka ímóti arbeiðnum.

Enn er ikki heilt greitt, hvør kostnaðurin verður, tí arbeiðið við tølunum er ikki heilt liðugt enn. Kostnaðurin fer at liggja um 40 milliónir krónur, men tað tað neyva talið er ikki klárt